# Tey sjálvstøðugu-vinnurekandi, lesandi og Miðflokkurin

**Steindor Hjaltalin**
*Valevni Miðfloksins í Suðurstreymi*

Vit rinda øll eina upphædd av okkara løn til arbeiðsloysisskipanina, tí at vit í felag vilja standa saman, um ein av okkum skuldi komið í ta torføru støðu, at mist arbeiði í styttri ella longri tíðarskeið. Hugsunarhátturin við skipanini er góður og solidariskur, men tó ikki so góður sum vit í Miðflokkinum vildu ynskt, at hann var.

Støðan er nevniliga tann, at ikki øll, ið rinda til arbeiðsloysisskipanina hava rætt til at fáa aftur frá skipanini, gerast tey arbeiðsleys.

Hetta er galdandi fyri tey sjálvstøðuguvinnurekandi. Vit vilja gera broytingar í skipanini, so at skipanin verður rættvísari og umfatar øll, eisini tey, ið hava tikið stigið og sett pening í egna fyritøku ella egið vinnutól.

Ein annar bólkur av løntakarum, ið rindar til skipanina, uttan at fáa nakað frá skipanini eru øll tey, ið arbeiða meðan tey ganga í skúla ella eru í læru.

Eg havi varhugan av at íkastið til arbeiðsloysisskipanina frá hesum bólki ikki er so lítið, tá saman um kemur.

Tí skjóta vit upp at hesin peningur verður tikin úr skipanini, og nýttur til at lætta um hjá næmingunum sjálvum. Eitt nú kann sjúkrakassin, tannlæknarokningin og ferðaútreiðslurnar til og frá skúla í Føroyum verða goldnar av hesum peningi.

Stuðla tí Miðflokkin og gev okkum møguleikan at loysa henda trupulleikan. Gott val.

# Gott er at kenna hitan frá hondum ið sleptu

**William av Vollanum**
*Valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy*



Henda tankan munnu nógv hava hugsað ein kaldan heystardag við einari ár ella spakanum hjá tí, sum vit avloystu í hond og okkara køldu fingrar enn kundu kenna hitan í trænum frá viðkomandi.

Øll skulu vit ígjøgnum hetta, einaferð at sleppa tí, sum vit dagliga takast við, um tað so er deyði, aldur, brek ella sjúka, sum koma at verða orsøk til tað.

Hvussu vildu vit, sum enn hava heilsuna og eitt starv at fara til, vilja hava havt almanna-og heilsupolitikkin í Føroyum at verði, um vit komu í ta støðu, at vit orsaka sjúku, brekið ella høgum aldri noyddust at sleppa og lata ein annan koma í okkara stað.

Eitt grundstøði í almanna- og heilsupolitikkinum í Føroyum má verða, at har tørvur er á hjálp, eigur hon at verða veitt skjótt.

Vit mugu ásanna, at ov lítið er komið burturúr á eldra økinum seinastu árini. Her er ætlanin hjá Fólkaflokkinum, at kommunurnar skulu yvirtaka eldrapolitikkin, soleiðis at frástøðan millum brúkara og mynduleika verður minst møgulig. Kommunurnar eiga at verða stuðlaðar til at loysa tørvin á ellis- og røktarplássum sum skjótast.

Eldri fólk skulu tó kunna búgva heima sum longst, og má tann primera heilsutænastan verða løgd til rættis eftir tí. Eisini eiga gomul, sum ikki orka at røkja egin hús at kunna velja aðrar bústaðir.

Heimahjálpin má víðkast til at umfata samdøgurvakt, og rørslutarnað skulu fáa betri atgongd til hjálpitól o. a. stuðul.

Fólkapensjónin skal verða á sømiligum støði, og grundupphæddin skal verða skattafrí.

Tá landsjúkrahúsið verður liðugt út- og umbygt, verður játtanin síðan brúkt til at tryggja eitt landsumfatandi heilsuverk í Føroyum.

Eitt av høvuðsmálunum í føroyskum politikki má verða, at tey sum eru veik, sjúk, eldri ella brekað skulu hava mannsømilig kor í Føroyum, og arbeiðast má fram ímóti, at øll kunnu siga, at:

"Gott er at kenna umsorgan frá almanna- og heilsu verkinum í Føroyum, tá hendurnar sleppa."

Gott val.

# Hjálp til Hans Jákup Olsen

**Høgni Mikkelsen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreym*



Tú biður meg hjálpa tær at greina munin millum almennan stuðul til privat virkir og verandi blokk, sum "Felagsríkið" letur til Føroyar.

Aðalmunurin kann greinast soleiðis :

1. Verandi blokkur er ein endurgjaldsskipan í okkara felagsskapi við Danmark.

   Blokkurin er eitt gjald fyri tað arbeiðið, sum liggur í teimum økinum, ið ikki enn eru fult yvirtikin. Vit tosa her um alment endurgjald til alment endamál.
2. Almennur stuðul til privat virkir er ikki endurgjald fyri nakað ávíst arbeiði.

   Her verða almenn og privat áhugamál blanda saman.

**Politisk viðmerking til tín spurning :**
Sambandsflokkurin hevur ikki biðið um blokkin. Loysingarflokkarnir eiga blokkin við húð og hár.

Loysingarflokkarnir hava hækkað blokkin líka fram til 2002. Loysingarflokkarnir hava framt yvirtøkir uttan at lækka blokkin, teir hava framt hálvar yvirtøkur - gjaldsleysar yvirtøkur.

Sambandsflokkurin hevur verið og er framvegis ímóti yvirtøkum, sum vit ikki gjalda fyri.

Skulu vit yvirtaka so skulu vit eisini gjalda.

Tað er annars als ikki neyðugt, at peningaveiting millum lond í einum felagsskapi avskepla kapping. Heimsrákið í dag er, at lond finna saman í felagsskapir fyri at menna vinnulívið, menna kappingina, menna framburðin. Heimsrákið er soleiðis greiður Sambandspolitikkur.

# Føroyar eru ein tjóð

**Reimund Langgaard**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Í Móðurmálsorðabókini lesa vit m.a.:

Føroyingur: fólk í el. úr Føroyum

Tjóð: stórur flokkur av fólki av somu rót og við felags máli, mentan, søgu o.tíl. (kennir seg sum eina eind og býr vanl. í sama landi)

Móðurmálsorðabókin er sera greið, tá hon útgreinar hvat liggur í hugtøkunum, ein føroyingur og ein tjóð. Tað er tí harmiligt, at nógv fullveldisfólk sáa iva um okkara samleika.

Eg veit, at eg eri føroyingur, og tað eri er errin av. Samstundis ynski eg at varðveita eitt liviligt samfelag fyri allar mínar landsmenn, og er tað ein av grundunum til, at eg eri sambandsmaður.

# Polariseringin er størsta hóttanin ímóti sjálvstýristilgongdini - og Føroya framtíð!

**Uttan ein sterkan Fólkaflokk,- steðgar sjálvstýristilgongdin upp!**

**Tummas í Garði**
*Valevni Fólkafloksins í Eysturoynni*



Vit eru komin longur á sjálvstýrisleið seinasta valskeið enn øll tey undanfarnu valskeiðini síðan heimastýrislógina.

Vit havt fokus á spurninginum loysing/samband sum ongantíð áður.

Teir mest víttgangandi loysingar-mennirnir hava frøtt seg: Jú meira kókar, tess skjótari er vegurin til "republikkina".

Hinumegin vena sambandsmenn seg um dómadag og undirgang, um nortið verður við "blokkin ella Drotning Margrethu".

Hvørjir av hesum pørtunum hava so sannleikan í skjøldri sínum?

Hvørgin er nær námind á leið!

Sannleikin liggur sjálvandi einastaðni mitt ímillum:

Uttan eina lagaliga búskaparliga tillaging fyrst, kemur eingin verðulig broyting í okkara ríkisrættarligu støðu.

Hvussu skulu vit so koma víðari? Skal sjálvstýristilgongdin steðga upp nú?

Einasta gongda leið er ein loysn sum fólkið tekur undir við!

Hesin leistur liggur í "Sjálvstýrissamtyktini". Eina stigvísa minking av blokkinum yvir 10 -12 ár siga allir teir stóru flokkarnir seg kunna taka undir við.

Lat okkum so fáa eina breiða semju í lag, og leggja "processina" í eina trygga legu!!

Úrslitið 30. apríl kemur at fáa avgerandi týdning fyri sjálvstýristilgongdina.

Um tær hóvligu sjálvstýriskreftirnar, ella "miðjan" í føroyskum politikki ikki vera sterkt umboðaðar, steðgar øll sjálvstýristilgongdin upp!

Ein sterkur Tjóðveldisflokkur kann einki gera einsamallur, og ein reinur Javnaðar-Sambands-meiriluti førir okkum ikki ein millimetur nærri "sjálvberandi búskapi ella størri frælsi", tvørturímóti: Blokkur og Danskt Amt hómast ímillum reglurnar.

Ein sterkur Fólkaflokkur kemur at fáa avgerandi týðning. Við okkum heldur tann hóvliga sjálvstýristilgongdin fram, uttan okkum steðgar alt upp: Aftur til blokkstuðul og fjarðstýring av Christiansborg!

Eg vil tí heita á øll tykkum, sum ynskja gott samstarv og eina virðiliga støðu í viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark at fara á val og velja ein sterkan Fólkaflokk á ting.





# Sjálvstýri og eitt gott samfelag

**Jóhan M. Stenberg**
*Valevni sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*

Nú verður aftur val, og allir føroyingar kunnu nú brúka sín demokratiska rætt at fara á val at velja fólk í løgtingið.

Hetta er fyrstu ferð, eg eri uppstillaður til løgtingsval, og taki eg hesa avbjóðing í fullum álvara. Eg síggi tað sum ein stóran heiður at koma at standa á listanum hjá mínum flokki Sjálvstýrisflokkinum, har ið tey mætastu í sjálvstýrisrørsluni eisini hava staðið einaferð.

Sjálvstýrisflokkurin er ein av elstu flokkunum í Føroyum, og hevur tað næstan verið ein sjálvfylgja, at flokkurin hevur verið umboðaður á løgtingi.

Men hetta vilja spákonurnar ikki verða við hesuferð. Veljarakanningar hava víst, at undirtøkan fyri flokkinum er sera lág, men vit vita, at veljarakanningar hava fyrr víst skeiv úrslit, og vóni eg, at soleiðis verður eisini hesaferð.

Eg vil so gera mítt til, at flokkurin fær góða umboðan í løgtinginum.

Sjálvstýrisflokkurin er, sum navnið sigur, fyri fullum sjálvstýri. Tað merkir, at føroyingar gerast sjálvbjargnir, og at Føroyar verða viðurkendar sum ein tjóð. Vit taka undir við einari "stig fyri stig" skipan í sjálvstýrismálinum, hetta fyri at samfelagið kann laga seg til, at færri pengar koma úr Danmark, soleiðis at borgarin og landið ikki skulu verða verri fyri fíggjarliga.

Eg vil arbeiða fyri, at meirvirðisgjaldið verður lækkað og at tollurin á teim neyðturviligu vørunum lækkar, so at tað kann gerast bíligari at liva í Føroyum.

Harumframt skal skatturin á lønir ongantíð fara upp um 50%.

Vit eru langt frá at veita teimum veiku í samfelagnum nóg góð livikor, eitt nú er stórur mangul upp á vardar íbúðir til tey menningar- og rørslutarnaðu í Føroyum. Her skal leggjast ein ætlan, sum innan fýra tey næstu árini skal betra munandi um støðuna.

Ítróttin skal fáa tann neyðuga stuðulin, so at øll, ið eru áhugað, sleppa at íðka ítrótt. Ítróttin er jú besta fyribyrgingin ímóti, at ungdómar fella út í rúsevnir og leti.

Fólkaskúlin hevur tey seinastu árini fingið eina ov lítla játtan á fíggjarlógini, og av tí sama hevur nógv stríð verið um fólkaskúlan. Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða fyri, at játtanin passar til tað, ið krevst av fólkaskúlanum!

Eg vil enda við at heita á allar føroyingar um at standa saman um ein skilagóðan politikk, og tað gert tú einans við at fara á val og velja ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á ting.

## Prosentrokning

Karsten gletta man av tonnum
heldur krav frá yvirmonnum
út av lagi vera
tøl sum nærkast fýrs prosentum
tá ið goldið er við rentum
ei man kassin bera

Ellintur er fastur enn
hatta er til fáar menn
einki fingu seinast
men vit hava góða tíð
ei vit skulu valstríð í
nú skal munur beinast

So man mannahugsan vera
at prosent má Karsten bera
hatta har er sjálvgjørt
minnast hvussu áður gekk
tingløn heili seksti fekk
tá var einki óført

**edvard**

# Frádráttur til føroyskar handverkarar uttanlands

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Frádrátturin til handverkarar, sum arbeiða uttanlands, eigur at umskipast. Eftir mínum tykki hevur landstyrismaðurin við fíggjarmálum handfarið tað málið sera jánkasliga. Fyrst varð frádrátturin lækkaður frá 600,- til 300,- krónur um dagin. Og ætlanin var at fara niður á 100,- krónur. Men tað varð slept, tí her nærkaðist ov nógv vali til, at tað varð hildið ráðiligt.

Lækkingin niður í helvt hevur havt við sær, at handverkarar, sum arbeiða uttanlands eru farnir at nýta eina aðra reglu, sum ætlað var embætisfólki ella øðrum, sum vóru burtur í styttri tíðarskeið enn tær átta vikurnar, sum handverkarin skuldi vera burtur fyri at fáa frádrátt. Eftir hesi reglu er frádrátturin 610 krónur um dagin fyrstu 28 dagarnar og fer síðan niður á 45% restina av tíðini. Í fíggjarmálastýrinum visti vinstra hond helst ikki hvat høgra gjørdi.

**Føroyskt felag, ikki einstaklingar**
Talan er í grundini um eitt slag av misnýtslu, tí reglan varð ikki ætlað til tað, hon verður brúkt til í dag. Tað eigur at verða gjørt soleiðis, at handverkarar, sum fara uttanlands at arbeiða, skulu fáa fulla frádráttin aftur, treytað av, at teir arbeiða fyri eitt føroyskt felag, og ikki bara fara sum einstaklingar. Á tann hátt leggja teir vitan eftir seg í Føroyum og styrkja tær fyritøkurnar, sum eru her, og tað eiga teir at fáa samsýning fyri.

Set krossin við lista D, tað loysir seg.

# Suðuroyggin- perlan, ið politikarar gloyma

**Petur Karl av Rana**
*Valevni Miðfloksins í Suðuroy*

Tað, ið hevur eyðkent førda suðuroyarpolitikkin mongu farnu árini, eru orð, orð og aftur orð, heldur enn gerðir og virksemi. Okur skulu heilt aftur í 60-ini fyri at síggja stór tøk verða tikin fyri Suðuroynna. Burtursæð frá Sumbiarbergholinum, sum teir drígjaðu í áravís, eru vanvirðisliga fáar skattakrónur komnar aftur í oynna, tær eru allar móttiknar og brúktar við rubb og stubb á meginøkinum.

Tak landsverkfrøðingin sum dømi, hygg teg um í Suðuroynni, kom við mær á vandaøkið á Hovsegg ella á Fámjinsskarð og líkna so saman við autostratirnar norðanfjørðs! Av sonnum ein sigandi varði yvir politiska misrøkt av eini heilari oyggj.

Er tað tí at suðuroyingar ikki hava havt talsmenn og -kvinnur á løgtingi? Jahøvdu vit havt kvinnur, so hevði sikkurt verið øðrvísi, tí menninir, ið har hava verið, hava havt eitt í felag, so títt og knapt teir komu norður um suðuroyarfjørð, gloymdu teir, hví suðuroyingar valdu og sendu teir á løgting.

Miðflokkurin er kendur fyri at standa við givin lyfti! Hví ikki velja øðrvísi hesuferð, velja Miðflokkin at vera umboð títt á løgtingi? Tað kemur at vera tær, Suðuroynni og Føroyum at gagni.

# Viðmerkingar til Jóannis Eidesgaard

**Zacharias Bech**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*

Formaður Javnaðarfloksins er í grein nú um dagarnar farin at trola innanfyri mark. Hann er farin at leita fram tað sum hann metir eru gamlar syndir hjá Sambandsflokkinum "frem fra glemselen" fyri á tann hátt at royna at fáa sær atkvøður frá sambandssinnaðum veljarum. Hann hevur eisini ført seg fram sum formaður fyri ein flokk, sum vil verða verandi í ríkisfelagsskapinum.

Men hava tey, sum longu hava tikið støðu til at velja Javnaðarflokkin, og tey sum hava ætlanir um at velja sama flokk, ikki grund til at ivast ?.

Løgmann fyri einhvønn prís, er javnan at hoyra frá trúføstum javnaðarveljarum. Tað miseydnaðist í 1994, tað miseydnaðist aftur í 1998, men hesaferð skal tað verða.

Eg eri onga løtu í iva um at um Tjóðveldisflokkurin bjóðar Javnaðarflokkinum løgmann eftir valið, tekur hann ímóti við báðum hondum.

Tað kann lætt henda at Javnaðarveljarar ein morgun vakna við kaldan dreym við tí veruleika at tey hava valt sær Høgna Hoydal til varaløgmann.

Eg trúgvi eisini at Tjóðveldisflokkurin sær Javnaðarflokkin sum sín einasta møguleika at kunna koma at sita í Tinganesi eitt 4-ára skeið afturat.

Um javnaðarveljarar halda at hettar er nakað tvætl, so kunnu tey fyri tað fyrsta leita seg fram til politiska upprunan hjá formanninum, og síðani minna seg á útsagnir og atburð hjá sama formanni.

Við at velja Sambandsflokkin kanst tú føla teg tryggan um ein varandi ríkisfelagsskap.

Við Sambandsflokkinum – ímóti loysing!